Nýggi Smyril:

# Flótandi listasavn

**Saman við listfrøðingi hevur leiðslan á Strandferðsluni valt út sjey yngri, føroysk listafólk at prýða nýggja Smyril við egnum listaverkum**
**- Tá tú velur, velur tú eisini frá, og tað kann sjálvandi skapa kjak. Men vónandi verður tað av einum stimbrandi slag, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni**

SMYRIL OG LISTIN

*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Longu síðani farið varð í gongd við at byggja nýggja Smyril, hevur leiðslan á Strandferðsluni tosað um, hvussu veggirnir skuldu prýðast á ein áhugaverdan hátt og í tráð við arkitekturin á skipinum. Í samráð við arkitektin, Camilla Horn, og listfrøðingin, Inger Smærup Sørensen, gjørdi leiðslan tí av, at lata sjey føroyskum listafólkum, sum øll eru fødd eftir 1960, uppgávuna at prýða veggirnir á nýggja Smyrli við egnum listaverkum. Verkini eru nú klár og verða at síggja, tá nýggi Smyril fer í sigling.

### Samanhangandi heild

Tað er Camilla Horn, sum hevur teknað hølini umborð, og rættiliga nógv er gjørt burturúr sniðgevingini. Frá byrjan var tað umráðandi, at skapa eina samhangandi heild millum arkitekturin og útsjóndina á veggunum. Tí heitti leiðslan á listfrøðingin Inger Smærup Sørensen, sum saman við arkitektinum gjørdi tilmæli um, hvørji listafólk skuldu fáa uppgávuna.

- Tá tú velur, velur tú eisini frá. Spurningurin er so, um man skal tora at velja, ella lata vera, og lata okkurt annað meir tilvildarligt gera av. Og tað vildu vit ikki, sigur Kristian Davidsen, stjóri á Strandferðsluni.

Tey sjey listafólkini fingu fyrispurningin um at verða við tíðliga í summar, og sum skilst tóku tey øll væl ímóti áheitanini. Tey hava fingið hvør sítt øki at prýða við onkrum tilmæli um at lata litspæl hóska heildini, men annars hava ongar beinleiðis treytir fylgt við uppgávuni, sigur Kristian.



*At lata yngri føroysk listafólk myndprýða nýggja Smyril er ein góður máti at umboða bæði listafólkini, Føroyar og Strandferðsluna úteftir, heldur Kristian Dávidsen, stjóri á Strandferðsluni*



*Tey sjey listafólkini er vald eftir tilmæli frá listfrøðinginum Inger Smærup Sørensen*

### Mynd úteftir

Avgerðin um, at lata yngri, føroysk listafólk prýða skipið, er sjálvandi eisini ein partur av myndini hjá Strandferðsuni úteftir, sigur Kristian, og sipar í hesum viðfangi til, at á hendan hátt kemur nýggi Smyril eisini at virka sum eitt slag av listasavni við eini fastari framsýning. Ein faldari er eisini gjørdur, har kunnað verður listafólkini og teirra verk.

- Vit eru sannførd um, at hetta er ein góður máti hjá bæði listafólkunum og Strandferðsluni at umboða bæði seg sjálvan og okkara land, sigur stjórin á Strandferðsluni

Umframt føstu framsýningina er eisini eitt høli sett av, har ætlanin er at hava skiftandi framsýningar við øðrum listafólkum.

Listafólkini, ið fara at myndprýða nýggja Smyril, eru: Hansina Iversen, Ranvá P. Konoy, Marius Olsen, Bjarne Werner Sørensen, Anker Mortensen, Hanni Bjartalíð og Aggi Asgeirsdóttir.

